# Uppskot um nýggja valskipan lagt fram

**Fyrrapartin skipaði Innlendismálaráðið fyri kunnandi fundi um, hvussu okkara valskipan kundi sæð út í framtíðini. Um hesin háttur varð nýttur til løgtingsvalið í 2004, hevði Sambandsflokkurin mist sítt umboð í Norðstreymoy, og Sandoyggin hevði bert fingið ein tinglim**



VALSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Fólkaræðið er kanska torskildari, enn vit ofta geva okkum far um. Í øllum førum krevur tað nakrar góðar knokkar og óivað eisini nakrar góðar teldur at rokna út, hvussu vit finna tann besta rokniháttin, so at úrslitið eftir eitt løgtingsval best avspeglar atkvøðurnar fra veljararunum. Harafturat er torført at siga, hvat eitt sokallað "rættvíst" býti av atkvøðum er. Tey politisku atlitini eru nógv. Eitt nú skal støða takast til, um atlit skulu takast til eitt nú útjaðaran, ella um tey størru økini eru fyri vanbýti. Fólkatalið í teimum ymsu valdømunum kann eisini broytast.

Fyrrapartin skipaði Innlendisráðið fyri kunnandi fundi á Hotel Hafnia um nýggjan útrokningarhátt til løgtingsval. Fleiri av okkara fólkavaldu vóru komin saman at lurta eftir m.ø. Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingi, sum greiddi frá, hvørjum valskipanum føroyingar hava valt sínar løgtingslimir eftir gjøgnum tíðirnar, og Peturi Zachariassen, hagfrøðingi, sum fortaldi um valskipanir kring heimin.

Eftir fleiri kunnandi framløgur átti Martin Zachariassen, teldufrøðingur, tørn. Hann hevur saman við Peturi Zachariassen gjørt uppskot um, hvussu ein nýggjur útrokningarháttur til løgtingsval kann síggja út.

### 1998 og 2004 "ring" ár

Hann vísti á, at einhvør valskipan eigur at verða bygd á nakrar politiskar málsetningar. Møguligir málsetningar fyri eina føroyska valskipan átti verið at tryggja flokkarnar lutfalsliga, at tryggja eina støðuga landafrøðiliga samanseting, at sterkar staðbundnar fylkingar skulu hava møguleika fyri tingsessir og at valdømini skulu tryggjast lutfalsliga umboðan eftir støðd teirra.

Martin Zachariassen vísti á, at eitt nú vóru valini 1998 og 2004 "ring" sæð frá einum støddfrøðiligum sjónarhorni. Tá hendi nenviliga tað, at flokkar, sum fingu flestar atkvøður, ikki fingu flestar tinglimir.

Valdømini fáa sum nú er heldur ikki lutfalsliga umboðan sambært teirra støðd, og óvissa kann verða um tulkingar av pørtum av uppgerðini.

Fleiri hættir eru, at rokna eitt valúrslit. Um tann nýggi hátturin, sum feðgarnir Petur og Martin Zachariassen hava gjørt fyri Innlendismálaráðið, hevði verið samtyktur, hevði valúrslitið í 2004 sæð øðrvísi út, enn tað bleiv við verandi hátti. Eitt nú hevði Sambandsflokkurin fingið 8 tinglimir í mun til 7 í dag, av tí at Sambandsflokkurin reelt sambært tí endaliga roknistykkinum fekk 7,5 tinglimir. Tjóðveldisflokkurin hevði farið frá 8 til 7 tinglimir, tí kvotan hjá Tjóðvalúrslitinum í 2004 fekk 6,89 tinglim.

### Kann roynast á netinum

Tann nýggi hátturin hevði eisini ávirkað býtið av tingssessum í valdømunum. T.d. hevði Sambandsflokkurin mist sín tinglim í Norðstreymoy, meðan Javnaðatflokkurin hevði fingið eitt umboð afturat í Suðurstreymoy. Bert ein tinglimur hevði verið valdur í Suðurstreymoy, meðan nógv tað fólkaríkasta økið í landinum, Suðurstreymoy, hevði fingið 12 tinglimir.

Fyrimunurin við hesum nýggja rokniháttinum hevði sambært Martini Zachariassen verið, at hann uppfyllir teir politisku málsetningarnar betri ella eins væl og núverandi skipan, eins og hann tryggjar serliga at flokkarnir og valdømini fáa lutfalsliga umboðan eftir atkvøðutølunum. Harafturat verða veljararnir so javntstillaðir sum gjørligt, og hátturin ger ongan skilnað millum valdømis- og eykaumboð.

Fólk kunnu sjálv royna tann nýggja útrokningarháttin á www. setur.fo/valskipanir.

**FAKTA**

Valskipanir í løgtingssøguni
1854
1906
1923
Núverandi valskipan er frá 1978

27 valdømisumboð eru og 5 eykavald
Síðan 1987 hevur valrættaraldurin verið 18 ár

# Fólkateljing sum støði undir framtíðar hagtølum

**Tað eru nærum 30 ár síðani tann seinasta fólkateljingin fór fram, og tískil manglar hópurin av hagfrøðisligum upplýsingum – upplýsingar, sum skulu vera grundarlagið undir t.d. politisku avgerðum um, hvussu okkara samfelag skal skipast**

FÓLKATELJIJNG
*Tíðindaskriv*

– Óteljandi ferðir hevur verið gjørt vart við, at okkum tørvar grundleggjandi hagfrøðisligar og líknandi upplýsingar og vitan, sum eigur at verða tøk m.a. í sambandi við fyrisitingarliga og politiska viðgerð av ymiskum samfelagsmálum. Hetta verður eisini ofta nevnt sum ein afturvendandi trupulleiki í sambandi við arbeiðið við Visjón 2015, somuleiðis sum tað í gjár varð nevnt í sambandi við innsavningina hjá ST av upplýsingum, sigur Hans Pauli Strøm landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Grundað á hetta hevur Hans Pauli Strøm í longri tíð arbeitt við einum uppskoti um at seta í verk talgildar hagtalsskráir, har upplýsingar um ávís íbúgvaraviðurskifti, harí demografisk og sosial viðurskifti, bústaðarviðurskifti, arbeiðsmarknaðarog útbúgvingarviðurskifti, støðugt verða dagførdar.

Grundarlagið undir eini nýggjari hagtalsskipan er ein fólkateljing. "Vit fremja so at siga ta seinastu fólkateljingina, tí fyri at kunna seta í verk talgildar hagtalsskráir er neyðugt við dagførdum upplýsingum frá eini fólkateljing sum byrjunargrundarlag", greiðir Hans Pauli Strøm frá.

Á landsstýrisfundi í morgun tók landsstýrið undir við uppskoti landsstýrismansins, sum í fyrstu atløgu hevur við sær, at savnast skulu inn ein røð av fólkahagtølum og hagtølum um almannaviðurskiftini her í Føroyum.

Talan er um eina sera víðfevnda verkætlan, ið nemir við økir hjá flestu aðalráðunum:

Fíggjarmálaráðið, ið varar av Hagstovu Føroya, ið sum einstakur stovnur hevur størsta innlitið og førleikan á økinum – og sum skattamyndugleiki hevur Fíggjarmálaráðið tørv á neyvum og røttum upplýsingum um borgararnar, m.a. bústaðar- og familjuviðurskifti teirra.

Innlendismálaráðið, ið varar av kommununum og landsfólkayvirlitinum, og hevur beinleiðis áhuga í at dagføra landsfólkaskránna við upplýsingum frá fólkateljingini, m.a. fyri at kunna knýta upplýsingar úr landsfólkaskránni saman við nýggju adressuskránni.

Vinnumálaráðið, ið hevur tørv á upplýsingum um arbeiðsmarknaðin, sum í dag als ikki eru tøkir, um samansetingina av arbeiðsstyrkini, um førleikaviðurskiftini, um pendling, um starvsstøðu o.m.a.

Mentamálaráðið, ið varar av skúlaverki og Fróðskaparsetri, hevur tørv á, at grundleggjandi upplýsingar eru tøkir sum fyritreyt fyri samfelagsgransking yvirhøvur, eins og Mentamálaráðið hevur tørv á upplýsingum um útbúgvingarliga støðið í øllum fólkinum.

Almanna- og heilsumálaráðið, ið hevur tørv á nógvum grundleggjandi upplýsingum um almannaviðurskifti hjá borgarunum, sum í dag als ikki eru tøkir, m.a. um bústaðar- og íbúðarviðurskifti, familju- og húsarhaldsviðurskifti, upplýsingar um livikor o.m.a.

Ein verkætlanarbólkur við umboðum úr aðalráðunum, avvarðandi stovnum og kommunufelagsskapunum verður nú settur, og skal hesin gera eitt tilmæli um, hvussu ein fólkateljing í Føroyum skal fremjast.